**Almannamálaráðið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 30. august 2022 |
| Mál nr.: | 22/15059-1 |
| Málsviðgjørt: | HP/BÁT |
| Ummælistíð: | 30. aug til 26. Sep. |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

# Kunngerð um broyting í kunngerð um umsiting av samsýning fyri ansing av eldri og óhjálpnum persónum

(Hækking av veiting)

## § 1

Í kunngerð nr. 127 frá 17. desember 2014, sum broytt við kunngerð nr. 160 frá 13. desember 2018 um kunngerð um umsiting av samsýning fyri ansing av eldri og óhjálpnum persónum, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 3, nr. 2 verður ”67 ár” broytt til: ”fólkapensjónistur”.

**2.** Í § 4, stk. 2 verður ”kr. 10.789” broytt til: “kr. 18.000”.

**3.** § 5, stk. 3 verður orðað soleiðis: “*Stk. 3*. Kommunan ger ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri, um víkjast kann frá høvuðsregluni sbrt. stk. 2.”

**4.** Í § 5 verður aftan á stk. 3 sum nýggj stk. sett:
“*Stk. 4*. Í sambandi við ansing av meira enn einum persóni sambært stk. 2, nr. 1 kann kommunan, umframt samsýning sambært § 4, stk. 2, veita eitt ískoyti á 5.000 kr.
*Stk. 5*. Upphæddirnar sbrt. stk. 4 og sbrt. § 4, stk. 2 verða javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.”

**5.** Í § 9 verður stk. 2 strikað.

**6.** Í § 15 verður “kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum” broytt til: “Føroya Kærustovn”.

## § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virkna 1. januar 2023.

Almannamálaráðið, 30. august 2022

**Sólvit E. Nolsø**
landsstýrismaður

/ Eyðun M. Hansen

**Skjal 1**

# Heitið á skjalinum